# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein sambandsboomerang

Sambandsflokkurin tveitti í vikuni eina bumbu mitt inn í sína egnu samgongu. Flokkurin mælti gjøgnum tingmannin Edmund Joensen fíggjarmálaráðharranum til at taka stig til í samráðingunum við donsku stjórnina at strika fastfrystingina av ríkisveitingini. Hetta skuldi sambært Edmund Joensen kunna geva Føroyum einar 110 mill. kr. í landskassan. Peningurin skuldi brúkast til at forða fyri, at vælferðartænastur koma í vanda. Í skrivi vísti sambandstingmaðurin á, at Føroyar hava útlit til eitt risastórt hall á fíggjarlógini, og vælferðartænastur eru í vanda. Tí metti hann tað vera sjálvsagt, at Jóannes Eidesgaard bað danir um at loysa upp fyri fastfrystingini av ríkisveitingini.

Heldur margháttliga tíðindaskrivið skapti ikki sørt av órógvi í samgonguni. Jóannes Eidesgaard vísti á, at hetta var ikki í tráð við samgonguskjalið, og tí fór hann ikki at leggja upp til at tiðna fastfrysting av blokki. Frá Fólkaflokkinum var reaktiónin skjót og greið. Tað kundi ikki koma uppá tal at nema við blokkin.

Og so kom loksins reaktiónin frá fíggjarmálaráðharranum, sambært Kringvarpinum í gjárkvøldið, har hann gevur Sambandinum greitt svar uppá tiltalu. Hann hevur nevniliga longu boðað dønum frá, at blokkurin verður óbroyttur. Ein kann siga - ein nevi ella kanska ein fløt hond beint í andlitið á Sambandinum og her fyrst og fremst Edmundi Joensen. Um tað var ætlanin hjá Sambandinum at taka stólin undan javnaðarformanninum og seta hann skák mát í hesum bakbiti, sum Jørgen Niclasen kallaði tað, so fekk fremsti stjórnarflokkurin annað at merkja.

Enn einaferð mugu vit bara ásanna, at ABC byggir ikki altíð á tryggan botn. Útmeldingarnar eru ørkymlandi og ikki sørt óprofessionellar. Lítið er at ivast í, at løgmaður og formaður Sambandsfloksins missir trúvirði og álit millum manna og millum egnar samgongufelagar, tá eitt so álvarsligt mál sum at tiðna blokkin kemur út til almenningin á henda hátt, og har tónin minnir ikki sørt um eitt ultimatum til Javnaðarflokkin. Sjálvandi eiga so ymiskir flokkar í eini samgongu at kunna hava ymsar áskoðanir um eitt so stórt mál sum blokkin. Og sjálvandi kunnu og eiga broyttar tíðir eisini at lata upp fyri øðrum og nýggjum loysnum ella fyribilsloysnum. Men hetta er so stórt mál, at ein skuldi trúð, at tað átti at verið viðgjørt politiskt í samgonguni, heldur enn at enda sum valpolitisk kastibløka í almenna rúminum. Hvørvítt tað er rætt ella ikki at tiðna upp blokkin í eini støðu, har samfelagið hevur búskaparligar trupulleikar, vil altíð verða tengt at, hvørji eyguni eru, sum síggja. Sjálvandi høvdu góðar hundrað milliónir komið væl við í verandi støðu, men vil tað ikki bara vera ein stokkutur hiti, nú tað stríðir ímóti teimum avgerðum, sum samgongufelagar Sambandsfloksins hava tikið! Møguliga hevur Sambandið her sæð ein møguleika fyri at fáa tann særda Javnaðarflokkin aftur á beint tvs. á Sambandsleiðina. Men eftir avgerðina hjá Jóannesi Eidesgaard ikki at flyta seg ein tumma, kann henda manøvran hjá Sambandinum neyvan líkjast øðrum enn eini boomerang.

**Sosialurin**

## Manntal ella Fólkateljing

TINA K. JAKOBSEN



Í 2011 skulu tú og eg teljast. Fólkateljingin verður gjørd eftir ST leisti, og er fyrsta teljingin í Føroyum í meira enn 30 ár. Tað sigur sostatt seg sjálvt, at vit mangla nógvar upplýsingar um viðurskiftini í Føroyum, og fyri at fáa so neyvar upplýsingar sum møguligt er sjálvandi neyðugt, at spurnarbløð og tilgongdin annars er so objektiv sum yvirhøvur gjørligt.

Ella er tað nú tað?

Eftir øllum at døma, so er objektivitetskriteriið ikki eitt, ið liggur serliga ovarlaga á listanum í komandi fólkateljingini. Fólkateljingin er doypt Manntal, eitt navn, sum í mínum oyrum skurrar – eg eri ikki ein maður! Og nei, eg taki ikki undir við, at maður merkir menniskja.

Eg eri kvinna og um eg skal teljast, so vil eg fegin hava at tað verður kallað Fólkateljing.

Vit hava havt fólkateljingar í Føroyum fyrr, men Manntøl eru nýggj í Føroyum.

Eg dugi ikki at síggja nakra so tungtvigandi orsøk til at orðið skal broytast. Í skúlunum læra vit til dømis um fólkateljingar, ikki um manntøl. Ein og hvør skilir orðið fólkateljing – tað telur fólkið, men eitt manntal telur altso bara mannfólkini.

So kanska havi eg misskilt ætlanina hjá ST-leistin. Kanska skulu bara menn teljast í hesum umfarinum, kanska skal eg teljast við eina aðru ferð. Tí eitt er so sikkurt og vist – eg ætli mær undir ongum umstøðum at taka lut í einum manntali.

## Nú er tad ikki stuttligt longur!

ROLF GUTTESEN

rg@geo.ku.dk



Jørgen Niclasen sendi sunnukvøldið út eitt skriv, har hann átalar »útsagnir frá iranska forsetanum« um at holocaust ongantíð er farið fram. Nú er at spyrja: Hvat er á vási?

Er Niclasen úr Sørvági farin at hótta, rættleiða ella formana Ahmedinejad úr Iran? Ætlar hann at løða kanónina á Brimli, og senda kanónbátin til Babel-Mandeb strætið. So kann Vesturskin sleppa við sum supply-skip, um tørvur skuldi verið.

Eg havi leitað í arkivinum hjá bæði Kristeligt Dagblad og Politiken, men teir hava ikki nevnt nakað um hetta mál nýliga. Men hevur hann fyrr sagt tað.

**Er hatta 'føroyskur' uttanbíggja-politikkur?**

Nú havi eg ikki lisið alt, sum hasin landsstýrismaðurin sendir út. Tað mesta hevur einki upp á seg. Men Niclassen úr Sørvági er partur av samgonguni, hvat siga hinir partarnir? Eru tit við upp á hatta flippið? Tit mugu siga ja ella nei, tí hatta er bara djúpt tragiskt. Hvørki komiskt ella tragikomiskt, bara tragiskt.

Sjálvandi hava Føroyar áhugamál úteftir, sum skula røkjast og passast. Higartil var tað nakað, sum løgmaður saman við hinum kláraði. Men so einaferð kom Høgni Hoydal geipandi upp í eitt landsstýri og vildi vera uttanríkisministari, sjálvt um vit hava ein sovorðnan frammanundan.

Eg veit ikki, hvat ið Niclasen annars hevur úttalað seg um. Hevur hann úttalað seg um krígsbrotsverkini hjá Ísrael í Gaza herfyri? Og tað teir gjørdu í Libanon? Hvat um fangarnar í Guantanamo? Fólkadrápið í Rwanda? Kuppið móti Manuel Zelaya í Honduras.

Vit kunna avskaffa alt arbeiðsloysi í Føroyum, og seta fólk at skriva úttalilsir um hvat sum helst, hvar sum helst, nær sum helst, allarhelst, so eru øll frelst. Vit kunna fáa eitt risa ministerium, bara tí at summi fólkafloks- og tjóðveldisfólk (og onnur við) onki skil hava fyri realitetum.

**Rundferð til pinkulingaland**

Herfyri varð Niclasen eina langa ferð runt í Europa. Hann vitjaði akkurát tey allarsmæstu mini-lond, sum at kalla ongan reellan týdning hava. Tey eru til á papírinum, men einki annað. Kanska millumlendi hann í París, hví stakk hann ikki inn á gólvið hjá Sarkozy, ella hjá Merkel í Berlin? Hví flýggjar hann undan teimum reellu problemunum, sum liggja í sambandinum Føroyar-EU, rættari: tí manglandi sambandinum. Alt hitt er bara sjónleikur og facada. Gykl, humbukk.

Lat Jørgen Niclassen vera stjóra á Samvit, um hann hevur førleika til tað, tá starvið verður lýst leyst aftur. So kann hann eisini sleppa at ferðast eitt sindur. Lat uttanlandamálini fara aftur til Løgmann.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.